**Framleiðsla/søla**
*Lýsingartilfar*



*Fremst f.v.: Kirstin Olsen, Mary Berg, Hilda Johansen og Magdalena Nielsen. Aftast f.v. Karl Jóhan Olsen og Odmar Olsen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Føroysk framleiðsla **tá hon er best**

SNÆLDAN ER EITT KENT BRAND Á FØROYSKA MARKNAÐINUM. FAMILJUFYRITØKAN Á STRONDUM VIRKAR ALLA SÍNA FRAMLEIÐSLU FRÁ ULL TIL TÓGV OG KLÆÐNAPLØGG Í FØROYUM

**Magnus Gunnarsson**

Snældan er ein familjufyritøka, sum hevur yvir 60 ár á baki og verður í dag rikin av triðja ættarliði.

Tað var Karl Jóhan Olsen, sum legði lunnar undir Snælduna í 1949 við at spinna tógv úr ull, sum fólk komu við. Snældan verður í dag rikin av abbasoninum, sum eisini eitur Karl Jóhan Olsen.

Hóast Snældan alla tíðina hevur verið á somu adressu á Strondum eru fleiri um- og útbyggingar farnar fram hesi meira enn 60 árini. Maskinur eru skiftar út, og framleiðslan er alla tíðina tillagað marknaðin og eftirspurningin.

Virksemið hjá Snælduni á Strondum kann býtast upp í tvey: framleiðslu av tógvi og framleiðslu av bundnum pløggum. Rávøran hjá Snælduni er ullin, sum verður virkað til á virkinum.

Talan er um tveir virkisbygningar. Í framleiðsluhøllini verður ullin gjørd til tógv í ymiskum litum og í einum øðrum bygningi eru bindimaskinur har ein partur av tógvinum verður bundin til troyggjur, jakkar og húgvur.

Stjórin á Snælduni, Karl Jóhan Olsen, sigur, at Snældan er einasta virki av sínum slagi í Føroyum, og alt sum tey selja er framleitt á virkinum.

Snældan framleiðir tógv, sum verður nýtt til bæði einlittar troyggjur og troyggjur við mynstri. Umframt troyggjurnar framleiðir Snældan eisini tøvdar jakkar og húgvur í ymiskum litum og sniðum. Ein partur av framleiðsluni er karðað ull, sum t.d. verður nýtt til evning í skúlum og barnagørðum.

Umframt virkið á Strondum hevur Snældan eisini ein handil í Niels Finsengøtu í Havn, ið hevur eitt stórt úrval av tí, sum Snældan framleiðir. Lidnu vørurnar hjá Snælduni eru eisini at fáa á Vága Floghavn, hjá Andreas í Vágsbotni og Skipshandlinum í Havn, meðan tógvið er at fáa í nógvum handlum kring landið.

Seks fólk eru í starvi hjá Snælduni á Strondum umframt eitt starvsfólk í handlinum í Havn.

maggi@sosialurin.fo



